Fleyr-ÍF 3-1 (19-25, 25-23, 25-18, 25-22):

# Fleyr sendi ÍF niður á botn

*Fyri ÍF mundi tað koma illa við, at dómsnevndin staðfesti avgerðina um, at tær skulu spæla dystin móti Fleyr av nýggjum*




**Tað vóru tvey lið í andróðri, sum møttust í Gundadalshøllini til botndyst leygardagin. Tað eydnaðist Fleyr at vinna fyri fyrstu ferð í tveir mánaðir, og samstundis tapti ÍF fyri fimtu ferð á rað**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Longu í grundspælinum hava vit sæð fleiri »løgin« úrslit bæði hjá kvinnum og monnum. Og nú endaspælið byrjaði síðsta leygardag, sær út til, at vit eisini í seinnu helvt av kappingini fara at síggja nøkur óvæntað úrslit.

Fleyr og ÍF møttust í Gundadalshøllini, og her eydnaðist tað Fleyr at vinna 3-1. Fleyr, sum undan hesum dystinum hevði tapt fimm ferðir á rað - harav teir seinastu tríggjar 0-3 - móti ÍF, sum í byrjanini av kappingini var heilt uppi í toppinum, men sum nú er dragnað somikið, at tær eru niðastar.

Tað er eisini eitt sindur ørkymlandi, at dysturin millum hesi bæði liðini var tann fyrsti í endaspælinum, samstundis sum júst hesi bæði liðini enn hava ein óavgreiddan dyst eftir í grundspælinum.

Tað er nú endaliga staðfest, at hesin dysturin skal spælast av nýggjum, og fyri at siga tað stutt, so merkir tað, at Fleyr og ÍF skulu spæla ein dyst afturat, har vinnarin fær eitt stig og taparin einki.

Burtursæð frá Fleyrkvinnunum sjálvum mundu tey ikki vera nógv, sum høvdu roknað við, at Fleyr fór at vinna. Tað hevur gingið serstakliga illa í seinastuni, og eitt tap fyri og annað eftir hevur sum vera man ikki gagnað moralinum á liðnum nakað serligt. Men summi munnu eisini hava sæð, at formkurvan hjá ÍF hevur gingið niðureftir - og at hon hevur verið brøtt! Tær hava ikki vunnið síðani síðst í oktober, tá tær sigraðu 3-2 í Klaksvík (her er dysturin móti Fleyr 18. november, sum endaði 3-1, ikki tikin við), og síðani hava tær spælt fýra dystir og tapt teir allar. Sostatt bleiv tapið leygardagin tað fimta á rað hjá ÍF, og nú eru tær aftast.

Hvat úrslitið so annars merkir fyri liðini, er ikki gott at vita. Hjá Fleyr er tað eitt sindur spell, at jólasteðgurin er nú, tí tær høvdu helst einki havt ímóti at fingið nakrar dystir afturat beinanvegin, nú vindurin er í rygginum. Øðrvísi hjá ÍF, sum hevur brúk fyri steðginum eftir ta út av lagi vánaligu gongdina seinastu tveir mánaðirnar.

Fleyr-ÍF 2-3 (25-17, 25-23, 18-25, 14-25, 13-15):

# Sigurin hjá Fleyr endaði sum jólatrøll

**Eftir at hava verið aftanfyri 0-2 í settum vann ÍF sera óvæntað 3-2 móti Fleyr, sum við ósigrinum fekk eina stóra striku í FM-rokningina**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Soleiðis sum kappingin er uppbygd við einum grundspæli og einum endaspæli, har stigini frá grundspælinum eru koyrd í helvt, er tað ikki so løgið, at liðini hugsa sum so, at tað ræður um at halda so nøkulunda tørn í grundspælinum og so veruliga seta alt inn, tá endaspælið er byrjað, og øll stigini telja.

Tað hevur verið hugsanin hjá bæði SÍ, Fram og Fleyr, sum eru teir tríggir einastu veruligu FM-kandidatarnir í ár. Í ÍF hevur tað verið eitt sindur øðrvísi. Teir taptu allar dystirnar í grundspælinum, men so skjótt endaspælið byrjaði, vunnu teir!

Tað varð veruleiki, eftir at Fleyr hevði tveitt alt burtur og mist tvey stig, sum í síðsta enda kunnu vísa seg at vera avgerandi kostnaðarmikil.

Fleyr var stórfavorittur til at vinna dystin í Havn leygardagin. Við tveimum góðum sigrum móti oddaliðunum SÍ og Fram sum ballast varð roknað við, at teir fóru at gera skjótt av við ÍF, sum hevði verið kanónføði í allari kappingini.

Men tað nýggja ÍF-liðið verður sjálvandi betur samanspælt fyri hvønn dyst, sum gongur, og teir hava fleiri ferðir sagt, at fyrsti sigurin ikki er langt burturi.

Spurningurin er so, hvussu væl Fleyrmenninir hava lurtað...

### Vendi á hálvari leið

Tað byrjaði annars sum væntað við, at Fleyr vann fyrsta sett so trygt sum 25-17, og tá teir eisini tóku tað næsta 25-23, sá tað út til at vera »business as usual«. Men Fleyr-sigurin endaði sum eitt jólatrøll!

Tá eitt lið hevur vunnið tvey tey fyrstu settini, fær tað ofta trupult við at binda um posan, og ÍF vann triðja sett 25-18. Tað vóru tað ikki so nógv, sum blivu kløkk av, tí soleiðis er tað so ofta. Men Fleyr sá ikki ávaringarlampurnar, sum vóru farnar at blinka, og í fjórða setti gjørdi ÍF ikki mætari enn at smyrja Fleyr av 25-14.

Nú vóru fuglfirðingar av álvara farnir at tevja blóð, samstundis sum teir í Fleyr blivu nakkalangari fyri hvønn bólt. Seinasti settsigurin var skjótt langt burturi, og sum tað nátúrligasta í verðini vann ÍF fimta sett 15-13.

Fyrsti sigurin og fyrsta veruliga sensatiónin í bestu mansdeildini í ár var veruleiki.

Eftir sigrar móti SÍ og Fram høvdu teir í Fleyr alla grund til at vera bjartskygdir, men tveir sigrar móti oddaliðunum varð altso fylgt upp av einum tapi móti avgjørda botnliðnum. So óstøðug avrik skapa ongan føroyameistara, og spurningurin er, um hetta ikki var mønustingurin hjá Fleyr. Teir kunnu enn avgera alt sjálvir, men nú verður tað tungt.

Jólasteðgurin gevur tíð til eitt sindur av sjálvrannsakan.Fyri ÍF var tað ein hjartans lætti endiliga aftur at fáa kensluna av at vera vinnari. Tað er tungt, tá tú tapir hvørja einastu ferð, og umframt at tvey stig sjálvandi hava týdning, man tann sálarligi týdningurin av sigrinum viga mest. Tað hevði sítt at siga, at Odd Eliasen var við aftur á hevaraplássinum, tí tað loysir Bartal Eliasen til aðrar uppgávur, og knappliga var breiddin á ÍF-liðnum nógv størri. Fuglfirðingar kundu fara í jólafrí við góðari samvitsku, og teir kunnu fara inn í nýggja árið við góðum móti. Fyrsti sigurin er veruleiki.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 28. desember til hósdagin 3. januar**

## Forngripir úr útlegd




Á sumri í 2002 koma Kirkjubøstólarnir og aðrir føroyskir gripir aftur úr Danmark, sum danska mentamálaráðið og Mentamálastýrið gjørdu avtalu um á sumri í 1999. Síðani tá hevur ein nevnd við umboðum fyri Føroya Fornminnissavn og Nationalmuseet arbeitt við einum tilmæli til danska mentamálaráðharran um, hvørjir lutir skulu til Føroya, og hvørjir skulu verða verandi í Danmarik. Tó er framman undan greitt, at Kirkjubøstólarnir koma aftur til Føroya.

Arne Thorsteinsson, fornfrøðingur, hevur hesi tvey árini arbeitt við fyrireikingunum. Talan er um einar 800 gripir úr Føroyum á danska tjóðsavninum, leitaðir fram úr ymiskum goymslum. Nevndin hevur síðan mett um tann einstaka gripin, og um framtíð hansara eigur at vera í Føroyum ella í Danmark.

SvF fylgdi arbeiðinum nakrar dagar í heyst í vakra umhvørvinum í Brede norðan fyri Keypmannahavn, har Nationalmuseet hevur skrivstovur og goymslur. Og har bar til at sleppa fram at gripunum, áðrenn teir fara á eina serframsýning, sum Nationalmuseet skipar fyri til várs, við tí, sum skal aftur til Føroya.

Umframt Kirkjubøstólarnar eru nógvir áhugaverdir gripir, og summir so sjáldsamir, at teir bert finnast á danska tjóðsavninum. Onkrir hava sína merkisverdu søgu, og við onkran gerst ikki annað enn at seta spurningin, um nakar kennist við hann.

Jógvan Eli Dam og Bogi Godtfred gera sendingina.

Sendingin verður endursend hósdagin 3. januar..

**Manningin á hygg & hoyr ynskir lesarum sínum eitt gott nýggjár**

## Postkort úr Føroyum




## Vit á Longubrekku




## Tilbage til Oz




## Golfbanens skræk

